| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 30. apríl 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 05/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin S. Thomsen |
| | |

Ár 2009 tann 30. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. apríl 2009 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta fundin frá 23. apríl 2009, hetta sambært fráboðan til býráðslimirnar frá 15. apríl og kunngerð frá 17. apríl 2009 um sama.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen
Sonnni á Horni

**Skrivari:** Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari

**Mál nr. 20/2009.**

**Umsókn frá Hjalta Dalheim um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503v í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Hjalta Dalheim, dagfest 01. apríl 2009 og Fuglø arkitektum, dagfest 30. mars 2009 um byggiloyvi til sethús á matr nr. 503v í Stovugerði í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 15. apríl 2009, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. ***Í hesum sambandi verður víst á at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríðum opi, sum er minst 50 cm í breeidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.***
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti vegnum Stovugerði verður gjørdur í samráð við teknisku Deild.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovu viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd. Kloakkpalnur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
5. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deildini, og kloakkirnar skulu sýnast og verða góðkendar av teknisku deildini, áðrenn tær verða tyrvdar.
6. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.
7. Í sambandi við at háspenningarkaðal vm. liggur niðan móti komandi vegi, skal atlit verðað tikið fyri hesum, tá ið grevstrar- og planeringsarbeiðið verður gjørt.
8. Útgrevstrar og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantar og vegur ikki verða skaddir, og einki tilfar frá útgrevstrinum verður sløtt eftir vegnum og á landsvegin, har moldin verður løgd á Kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal hetta verða tikið upp beinanvegin, og møguligir skaðar verða umvældir.
9. Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:** Málið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 1 blankari atkvøðu. Petur Abrahamsen atkvøddi blankt. Vegna gegni fór Sonni á Horni av fundinum, meðan málið varð viðgjørt.

**Mál nr. 21/2009.**

**Umsókn frá SEV um byggiloyvi til transformatorstøð á Trøðni við Skarðsá.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Elfelagnum SEV, dagfest 16. januar 2008 um byggiloyvi til transformatorstøð á trøðni vestan fyri Skarðsá, og verður í hesum sambandi víst til umsókn felagsins, dagfest 19. desember 2000.

Tekniska nevndin hevur fyrr viðgjørt hetta mál og givið loyvi til, at transformatorstøðin verður sett, sum sýnt á hjáløgdu tekning, tó soleiðis at ávís krøv skuldu verða sett til útsjónd.

Tekniska deildin saman við Teknistovuni í Gøtu hevur gjørt uppskot til útsjónd, har bygningurin verður klæddur við vatntøttum revlum. Ætlanin er at gera uttanumøkið, planting verður framd frammanfyri og neyðug litseting, soleiðis at bygningurin kemur at hóska til økið.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt umsóknina á fundi tann 15. apríl 2009, og mæloir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært hjáløgdu tekning, og at arbeiðið viðvíkjandi útsjónd verður gjørt í tøttum samarbeiði við teknisku deildina.

**Avgerð: Tilmælið frá teknisku nevnd varð einmælt samtykt. (8,0)**

**Mál nr. 22/2009.**

**Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2010.**

Víst verður til skriv frá Føroya landsbókasavni, dagfest 26. november 2008 um innlatingarfreist fyri at lata inn fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri rakstrarárið 2010.

Mentamálanevndin hevur í hesum sambandi móttikið uppskot frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 15. apríl 2009 til fíggjarætlanfyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2010.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 659.136,00 móti mettum kr. 659.888,00 í 2009. Inntøkurnar av rakstrarstudningi verða mettar til:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 395.481,60 |
| Landskassastudninur | kr. 263.654,40 |
| **Samantals** | **kr. 659.136,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvari við nýggju bókasavnslógina, har býtið millum lan og kommunu verður 60% í kommununar part og 40% í landskassans part. Frammanundan varð býtið 40% í kommununar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó fingið kr. 184.000,00 fyri 2008, sjálvt um fíggjarætlanin fyri nevnda ár hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 665.736,00 og roknskapurin fyri 2008 hevur eina staðfesta rakstrarútreiðslu upp á kr. 652.252,11, sum skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 266.294,40.

Tilsóknin um rakstrarstuðul frá Landsbókasavninum fyri 2007, dagfest 08. februar 2008 gevur somuleiðis bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 184.000,00, har 40% satsurin átti at givið Fuglafjarðar bókasavni nakað tað sama sum árið fyri umleið kr. 250.000,00. Soleiðis góðkennir Føroya landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan, sum er størri enn kr. 460.000,00.

Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 263.654,40, sum henda fíggjarætlan leggur upp til.

Ætlanin hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 15. apríl 2009, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við málinum og samtykkja uppskotið til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2010, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 659.136,00, men heldur 40% av kr. 460.000,00.

**Avgerð: Tilmælið frá mentamálanevndini varð einmælt samtykt. (8,0)**

**Mál nr. 23/2009.**

**2. viðgerð av uppskoti til eykajáttan til rakstur av Mentanarhúsinum fyri 2009.**

Fíggjarnevndin varð á fundi 26. mars 2009 samd um, at játtanin, sum samtykt er at lata Fuglafjarðar sjónleikarafelag upp á kr. 550.000,00 fyri 2009, ikki verður broytt, men at kr. 470.000,00 verður rindaðar Norðoya sparikassa beinleiðis fyri kapitalútreiðslur til útlán nr. 039.034-2, meðan kr. 80.000,00 verða avsettar til viðlíkhald og uppgraderigar av Mentanarhúsinum.

Ein samd nevnd mælir býráðnum til at veita Fuglafjarðar sjónleikarafelag eina eykajáttan upp á kr. 100.000,00 til rakstur sum eina eingangsjáttan, og at játtanin til "Studningar hjá mentamálanevndini" konto 450010 verður hækkað úr kr. 650.000,00 upp í kr. 750.000,00, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgringslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Vísandi til § 41, stk. 2 mælir nevndin til, at eykajáttanin verður fíggjað av konto 610050 "Menningardeildin" undir kommunalu fyrisitingini. Samtykta játtanin fyri 2009 er kr. 200.000,00, men verður við eykajátanini lækkað niður í kr. 100.000,00. Játtanin krevur 2 býráðsviðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Talan verður sostatt um eina útreiðsluneutrala játtan, har talan verður um umflyting millum bólk 6 "Kommunala fyrisitingin" og bólk 4 "Skúla- og mentamál" í fíggjarætlan kommununar fyri 2009.

Sambært § 53, stk. 2.3. í kommunulógini skal ein møgulig eykajáttan verðað kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð.

**Avgerð á býráðsfundi 02. apríl 2009:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 23. apríl 2009. (9-0).

**Endalig avgerð við 2. viðgerð varð einmælt samtykt. (8,0)**

**<u>Mál nr. 24/2009.</u>**

**Mál viðvíkjandi "Skipa-, vøru- leigugjøldum við Fuglafjarðar havn".**

Kostnaðarbólkur mannaður av Sigurð S. Simonsen, Jákup Frants Larsen, Rólant Højsted, John Allani Midjord og Pæturi Joensen hava gjørt uppskot til "Skipa-, vøru- og leigugjøld" fyri Fuglafjarðar havn galdandi fyri tíðarskeiðið 01. mei 2009 til 30. apríl 2013.

*Bólkurin varð á fundi tann 07. apríl 2009 liðugur við sítt arbeiði, og eru gjøldini fyri upp og avskipingar yvir Fuglafjarðar havn sambært uppskotið hækkað við 20%-um í mun til gjøldini frá 01. august 1995.*

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 15. apríl 2009, og mælir nevndin býráðnum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot soleiðis, at hetta verður galdandi í eitt 4 ára skeið frá 01. mei 2009 at rokna fram til 30. apríl 2013.

Eisini verður mælt til, at redmarkið, sum ídag er galdandi "Sunnanvert Ennið í eystan í Toftanesá í vestan", verður flutt úr "Heimarugjógv í eystan til Ytru Hellá í vestan".

Sambært uppskotinum verður havnagjaldið hækkað úr kr. 0,65 upp í 0,80 fyri bruttotonsið, meðan brúgvagjaldið verður hækkað úr kr. 0,55 upp í 0,70 somuleiðis fyri bruttotonsatalið.

Havnameistarin kannar gjøld fyri leysari leigu hjá øðrum kommunum til komandi fund í havnanevndini.

**Avgerð: Tá málið kom fyri, legði Sigurð S. Simonsen framm eit broytingaruppskot til bólk IV í "Skipa-vøru- og leiguskránni" um at punkt d) verður broytt til "Fyri bingjur ella skiftilastir á 20 fót verður kostnaðurin 5 kr. um dagin og fyri 40 fót bingjur verður kostnaðurin kr. 10 um dagin. Í síðsta punkti í sama bólki verður 1,00 kr broytt til 0,20 kr., fermeturin.**
**Í báðum førum var málið einmælt samtykt. (8,0)**

**<u>Mál nr. 25/2009.</u>**

**Uppskot til reglugerð fyri Umhvørvisnevndina**

Nevndin hevur fingið til viðgerðar uppskot frá fyrisitingini um reglugerð fyri umhvørvisnevndin og hevur gjørt hesar viðmerkingar til málið á fundi 16. apríl 2009:

Mælt verður til hetta ískoyti til **§ 2 í fyriliggjandi uppskoti.**

Stk. 3 Nevndin fær til viðgerðar kærur sum koma til kommununa á umhvørvisøkinum, og ger tilmæli hesum viðvíkjandi.

Stk. 4. Nevndin kann taka upp mál á umhvørvisøkinum og gera tilmæli hesum viðvíkjandi.

**Avgerð: Tilmælið um ískoytið til § 2 varð einmælt samtykt. (8,0)**

**Mál nr. 26/2009.**

**Skriv frá Fiskiveiðueftirlitinum um leigu av høli frá kommununi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fiskiveiðueftirlitinum, dagfest 08. desember 2008 við ynski um høli til eftirlitið, har eftirlitsfólk kunnu halda til, tá ið tey gera eftirlitsuppgávur í Fuglafirði.

Tann 31. mars 2009 vóru Elmar Højgaard og Jóhan Simonsen frá Fiskiveiðyeftirlitinum á vitjan í Fuglafirði í sambandi við umsóknina, sum send varð kommununi. Havnameistarin, býráðsskrivarin og býarverkfrøðingurin høvdu ein stuttan fund saman við teimum.

Teir vístu áhuga at leiga tann ovasta partin av innrættaðu hølunum í landingarmiðstøðini, sum umfata fundarhøli, tekøk, toilett og gongd, somuleiðis sum egin inngong er vestureftir. Samlaða víddin er umleið 34 fermetrar, og er leigan sum kommunan ídag rindar í sambandi við sosialu deild, árliga umleið kr. 15.000,00.

Skal hetta leigumal lata seg gera, er neyðugt, at leigumálið við teir, ið hava landingarmiðstøðina verður uppsagt. Í øllum førum tann parturin, sum umfatar hesi hølir. Sum nú er verður sáttmálin ikki hildin, við tað at teir eru langt afturút við leigugjaldi, og skuldin bara økist.

Havnanevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. apríl 2009 og mælir býráðnum til, at leigumálið við SP/F MBT verður sett úr gildi, grundað á at leiguavtalan ikki er yvirhildin, og at leigumál verður gjørt við Fiskiveiðueftirlitið um leigu av umleið 34 fermetrum, sum umfata fundarhøli, tekøk, toilett og gongd vestureftir. Sostatt koma teir at hava egna inngongd.

Nvendin mælir somuleiðis til at góðtaka fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála, tó soleiðis at tíðarskeiðið í § 3 verður broytt til frá 01. juni 2009 til 01. mei 2010 ella so skjótt sum kommunan er leys av sáttmálanum við verandi leigara. Uppsagnartíðin verður 3 mánaðar.

**Avgerð: Tilmælið um at at seta leigumálið við SP/F MBT úr gildi, varð einmælt samtykt. (8,0) Somuleiðis varð tilmælið um at góðtaka fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála einmælt samtykt. (8,0)**

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19,00

Dánjal vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari: Marin S. Thomsen